FS Vágar-Sumba 5-0 (2-0):

Eingin mótstøða

Vágamenn fingu lætt spæl í seinasta heimadystinum, og Sumba skal taka sær um reiggj, um hóttandi niðurflytingin ikki skal gerast veruleiki

2. DEILD
Jákup Mørk

Tað var spæl til eitt mál, tá FS Vágar um vikuskiftið leikti seinasta heimadystinum á árinum.

Uppflytingina hava teir sum kunnugt langt síðani rokkið, og móti illa sperdu sumbingunum staðfestu teir enn einaferð, at teir hava so nógv tað besta liðið í 2. deild.

Skal takast saman um dystin í stuttum, so var talan um einvegis ferðslu úr enda í annan. Kanska skaptu vágamenninir ikki so øgiliga nógvar upplagdar møguleikar, men teir trýstu alla tíðina og lógu alla tíðina framvið, og fimm ferðir eydnaðist teimum eisini at finna vegin fram til meskarnar í sumbiar-málinum.

Í endanum vóru sumbingar bert hendinga gestir, og at teir valla høvdu nakran veruligan málmøguleika í samfullar 90 sigur eisini nakað um, hvussu einstáttað framførslan í Vágunum var.

Sum nevnt, so var talan kanska ikki um teir heilt nógvu opnu málmøguleikarnar, men hinvegin var hóttanin har alla tíðina, og eftir at hava trýst eina løtu, fekk heimaliðið hol á. Talan var um frispark úr høgru, sum Jens Erik Rasmussen sendi innfyri, og við nærmaru stong fekk Bjarni Prior sett høvdið á.

Nakað seinni var aftur galið í sumbiar-verjuni við deyðbóltsstøðu. Hornaspark varð sent høgt innyvir málið, og við aftaru stogn stóð Sjúður Ellefsen púra leysur, og hann var ískaldur, tá hann fyrst tamdi við bringuni, áðrenn hann smekkaði upp undir nettakið.

Við tvey-mála leiðsluni í rygginum, var dysturin í roynd og veru avgjørdur, og tað, sum eftir var, ráddi um at hjá vágamonnunum at fáa krónutalið fyri málpartabrøvini so høgt sum gjørligt.

Tað gjørdist talan um trý mál afturat. Fyrst var tað Ruslan Screlea sum stóð púra leysur, eftir at Vilva og Jack Johansen høvdu leikt seg ígjøgnum. Nakað seinni endaði ein langur bóltur inn um verjuna við, at Jack Johansen gjørdist leysur við málverjanum, og at enda var tað Kim Poulsen, sum átti seinasta fótin eftir hornaspark og klumpspæl.

Stendur nógv á

Soleiðis er alt nú klárt hjá vágamonnum, áðrenn teir í seinasta umfarinum fara til Fuglafjarðar eftir heiðurskrónum og steypi, men hinvegin stendur heilt nógv á hjá sumbingum.

Komandi vikuskifti skulu teir spæla móti NSÍ, og tann dysturin verður í øllum førum avgerandi fyri, hvat lið skal spæla um upp- og niðurflyting móti tvey'aranum í triðju deild, og um illa vil til, kann taparin av dystinum enda niðast í deildini.

Dysturin í tølum

FS Vágar-Sumba 5-0 (2-0)
1-0: Bjarni Prior
2-0: Sjúrður Ellefsen
3-0: Ruslan Screlea
4-0: Sonni Johansen
5-0: Kim Poulsen

B68-VB 4-0 (1-0):

B68 í nýggjari útgávu vann stórt

Øssur Hansen gjørdi reint hat-trick, tá B68 – við 10 monnum stóran part av dystinum – vann stórsigur á VB

Hóast teir í ein lítlan tíma vóru undirmannaðir, so vóru toftamenn greitt omaná ímóti gestunum úr Vági, sum tóktust leingjast eftir kappingarendanum

B68–VB
Jóannes Hansen

Eftir oyðimarkargongd í seks dystum upp í slag uttan sigur gjørdi B68 ein orduligan vørr á heimavølli í fyrstu royndini, eftir at venjaraskiftið hevði verið.

B68 kom skjótt á odda, tá Øssur Hansen við frágera góðum høgrabeinsskoti úr sekstan metrum og eitt lítið sindur til høgru smekkaði upp í nettakið. Uppspælið byrjaði við innkasti á miðjuni í vinstru. Vágbingar ansaðu illa, Jann Ingi Petersen spældi Fróða Benjaminsen, sum við góðari sending spældi Øssur Hansen, sum kom við nógvari ferð, púra leysan.

Harvið vóru lunnar lagdir undir heimasigurin. Vágbingar vóru sera verjukendir frá fyrsta bríksli. Teir vóru illa mannaðir, og teir dyrgdu eftir javnleikinum. Hvussu dysturin hevði myndast, um royndin hjá Marek heilt tíðliga úr 24 metrum hevði farið í málið í staðin fyri at taka stólparótina, ber ikki til at siga, men fyritreytirnar at fáa stig høvdu sjálvandi verið nógv betri.

VB var vandamikið í onkrum snarálopi, og B68 málverjin var onkra ferðina eyka aftasti maður. Jón Pauli Olsen hevði góða royndur úr vinstru, og Slobodan Madzar royndi úr spískum í høgru, men Michal Kokoszanek vardi væl fyri í hesum førunum, og tá vágbingar onkra ferðina í 2. hálvleiki komu ígjøgnum.

VB tók ikki av

Stóri maðurin á heimaliðnum var veteranurin og fyrrverandi landsliðsmaðurin, Øssur Hansen. Hesa ferð var hann á miðvøllinum saman við Fróða Benjaminsen og Jann Inga Petersen. Tað bar tyngd við sær í uppspæli, og Øssur var meiri málsøkin, enn hann hevur verið fyrr í ár, tá hann hevur verið á vinstra veingi. Álopshóttanin gjørdist ikki minni av, at Predrag Zivkovic í miðverjuni hjá VB var meiri enn hálvskaddur, og harvið var uppgávan hjá Jacobsen tvíburðunum eyka stór.

VB fekk møguleikan at koma afturíaftur, tá B68 fimm minuttir undan steðginum misti Fríðin Ziskason, sum sá gult fyri aðru ferð. Men tað kiksaði fullkomuliga hjá vágbingunum, sum eftir steðgin vóru sera lítið mobilir, gjørdu eina rúgvu av mistøkum og spiltu seg burtur, tá teir fýra ferðir vóru í góðum steðgum at gera mál. Manningin, tunni bonkurin og avrikið í síni heild bendi á, at VB hetta vikuskiftið hevði prioriterað næstbesta liðið framum besta liðið, og at fleiri av teimum, sum vóru á Svangaskarði, mest av øllum trongdu til vetrarfrí.

Annað lag

Øssur Hansen økti til 2–0 upp á brotsspark, tá seinna umfarið var seks minuttir gamalt. Fróði Benjaminsen kom við ferð í brotsteigin við bóltinum, ein verjuspælari royndi at takla, Fróði fór um koll, og dómarin metti, at talan var um brotsspark. Tað vóru vágbingar als ikki samdir við honum í.

Tá Øssur seks minuttir seinni økti til 3–0, var VB verjan fullkomuliga burtur. Fróði Benjaminsen vann bóltin á miðjuni, og Jann Ingi Petersen sendi púra leysa Øssur Hansen avstað.

John Heri Dam staðfesti størsta B68 sigurin í ár. Eftir innlegg úr høgru frá Marlon Jorge drønstútaði hann úr tiggju metrum dygst inn við handara stólpanum.

– Vit sýndu nógv betri hugburð, enn vit hava gjørt nógvu tær seinastu ferðirnar. Avrikið vísti, at broytingarnar, sum vit høvdu gjørt í spælskipan, manning og liðsamanseting riggaðu væl, og vit fluttu liðið nógv skjótari fram á vøllin, enn vit hava gjørt fyrr í ár, tá talan altíð hevur verið um nógvar verjukendar bindingar, staðfesti dagsins maður Øssur Hansen, sum gjørdi hattrikk, eftir dystarenda.

Hvussu taklaðu tit støðuna, tá tit høvdu mist ein mann?

– Síðstu fimm minuttirnar undan steðginum lótu vit sum einki. Í steðginum gjørdu vit av at flyta Jann Inga, Fróða og meg nærri saman, men annars hildu vit fram, sum vit høvdu gjørt, burtursæð frá at John Heri Dam kom inn í vinstru.

Og hvussu verður tær næstu ferðirnar?

– Eftir at vit hava mist so nógv, mugu vit arbeiða fyri at fáa sum frægast burturúr. NSÍ í Runavík verður torfør avbjóðing, men vit gleða okkum, sigur Øssur Hansen.

Dysturin í tølum

B68-VB 4-0 (1-0)
1-0: Øssur Hansen 13
2-0: Øssur Hansen br. 51
3-0: Øssur Hansen 57
4-0: John Heri Dam 67
Dómari: Birgir Sondum

B68: Michal Kokoszanek – Hans Fróði Hansen, Oleif Joensen, Messias Perreira – Marlon Jorge, Jann Ingi Petersen, Fríðin Ziskason, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen – Anders Nygaard, Øssur Jacobsen

VB: Bjarni Johansen – Slobodan Madzar, Eyðun Jacobsen, Predrag Zivkovic, Magni Jacobsen – Mortan úr Hørg, Dan Djurhuus, Palli Augustinussen, Marek Vierzbicki, Nenad Zivanovic – Jón Pauli Olsen

KÍ-GÍ 5-1 (2-1):

Tað er ferð í klaksvíkingum

Allan Mørkøre og KÍ hava sett fulla ferð á móti silvurmerkjunum, og um vikuskiftið gjørdist tað til stórsigur á gøtumonnum

Enn eina ferð gjørdi KÍ bonkurin um seg, tá tað stóð á ímóti GÍ, sum orduliga fór niður við nakkanum, tá teir mistu ein mann

KÍ–GÍ
Jóannes Hansen

Tað var ein av teimum góðu fótbóltsdøgunum í Klaksvík sunnudagin. Heimaáskoðararnir fingu fult fyri atgongugjaldið. Veðrið var fagurt, og heimaliðið vann stórsigur. Tá trúgvu KÍ viðhaldsfólkini fóru at húsum, mundu tey iðra seg um, at skráin ikki er løgd soleiðis, at teirra lið eigur ein dyst eftir ímóti HB. Men fyribils eru tað silvurmerkini, sum tað snýr seg um.

Sum so mangan áður á heimavølli, so legði KÍ fyri sum eitt ódnarveður. Jóan Petur Olsen var neyðloysn í GÍ verjuni, sum kom undir stórt trýst fyrstu løtuna. Bjarte Vettelstad var enn eina ferð í KÍ álopinum. Heðin á Lakjuni gjørdi nógv um seg, og Allan Mørkøre var fremstur á miðvøllinum, har hann hevði leysan leiklut og ferðaðist úr borði og í borð.

Tá KÍ legði seg á odda, átti Allan Mørkøre fríspælingina inn um verjuna. Heðin á Lakjuni gjørdist leysur og sendi framvið Mortani Joensen, sum aftur hesa ferð vardi GÍ málið.

Eftir leiðslumálið megnaði KÍ ikki at varðveita trýstið. Spælið javnaðist út. Góði GÍ miðvøllurin fekk tak á. Tað varð ongantíð ófantaligt, men tað vóru nógir nærdystir, og upplløgdu málmøguleikarnir vóru ikki so nógvir.

Tá GÍ javnaði, høvdu teir góða løtu verið væl við. Innleggið kom úr vinstru, og Súni Fríði Johannesen var blankur, tá hann sendi upp undir nettakið.

Klaksvíkingar svaraðu aftur undan steðginum, og umframt dygdirnar hjá KÍ, so má málið skrivast á kiks kontoina í GÍ verjuspælinum. Allan Mørkøre tveitta eitt av teimum heilt longu innkøstunum úr vinstru, og Hjalgrím Elttør var púra leysur, tá hann við handara stólpan fekk loyvi at heilflukta dygst innanfyri handaru stólparótina.

Breiður bonkur

Meðan gøtumenn vóru noyddir at taka til neyðloysn – Jóan Petur Olsen hevur vant millum lítið og einki í ár – tá Poul Ennigarð ikki kundi vera í miðverjuni, so sótu fleiri væl kvalifiseraðir KÍ spælarar á beinkinum og trippaðu eftir at sleppa upp í part. Tveir teirra komu á vøllin, og báðir áttu lut í málunum, sum bóru trivaliga heimasigurin við sær.

Spælið hevði gingið javnt á, tá KÍ tíðliga í 2. hálvleiki økti um leiðsluna til 3–1. Harley Bertholdsen hevði avloyst Bjarte Vettelstad. KÍ umskipaði, soleiðis at Hjalgrím Elttør fór í álopið, og Harley kom inn á miðvøllin. Eftir diagonalsending úr vinstru tamdi Harley í høgru bóltin fram um seg, og so fluktaði hann við vinstra beini. Bólturin tók í ein verjuspælara og sigldi í kassan.

KÍ sigurin tóktist í eygsjón, og vánirnar styrktust uppaftur meiri, tá GÍ liðformaðurin, Sámal Joensen, sá reytt. Eftir fríspark til KÍ, sum Bartal Eliasen og Heðin á Lakjuni vóru partar av, komu Allan Mørkøre og Sámal Joensen upp at tottast, og dómarin vísti gøtumanninum, sum kendi dómin heilt órímuligan, reyða kortið.

KÍ yvirtakið øktist, tað komu tvey mál afturat, og í báðum førunum vóru ungu KÍ spælararnir partar av støðuni. Í tí fyrra førinum spældi Símun Joensen, sum hevði avloyst Jan Joensen, Heðin á Lakjuni leysan til skot, men Mortan Joensen hálvbjargaði. Bólturin støkk til Allan Mørkøre í høgru, sum legði flatt innfyri, og Hjalgrím Elttør var á rætta staðnum.

Í seinna førinum var tað tryggi vongverjin í høgru hjá KÍ, Atli Danielsen, sum legði innfyri, og Símun Joensen stútaði av brotsparksblettinum og niður í málhornið.

Dysturin í tølum

KÍ-GÍ 5-1 (2-1)
1-0: Heðin á Lakjuni 2
1-1: Súni Fríði Johannesen 24
2-1: Hjalgrím Elttør 34
3-1: Harley Bertholdsen 64
4-1: Hjalgrím Elttør 67
5-1: Símun Joensen 90

Dómari: Páll Augustinussen

KÍ: Meinhardt Joensen – Atli Danielsen, Ove Nysted, Alexander Djordjevic, Rúni Elttør – Jan Joensen, Allan Mørkøre, Allan Joensen, Hjalgrím Elttør – Bjarte Vettelstad, Heðin á Lakjuni

GÍ: Mortan Joensen – Bartal Eliasen, Jóan Petur Olsen, Leivur Hansen – Súni Olsen, Sámal Joensen, Magni Jarnskor, Zdizlaw Janik, Bárður á Lakjuni – Súni Fríði Johannesen, Krzystof Popczynski

Fiskamarknaður Føroya 10 ár

Fiskamarknaður Føroya hevur nú
10 ár á baki. Í hesum sambandi bjóða
vit øllum viðskiftafólki, og áhugaðum,
til móttøku í hølum okkara á Toftum
týsdagin tann 24. september frá
kl. 15:00 til 17:00.

Fiskamarknaður Føroya
www.fmf.fo

REPROZ - 319540

Alka-Mine
korall kalsium
ALKA-MINE
við korall kalsium úr Sango korallum úr Okinawa, Japan.
Í Teposa-liknandi posum, klárt at koyra í vatn.
Fæst hjá:
Heilsan Helgi Højgaard
Skilakeyp Tórshavn, tel 317717
Heygabúðin Klaksvík, tel 455228
Hjá Randi Miðvági, tel 333870
Oliver Øster Eiði, tel 423004
Osla Sørensen Norðdepil, tel 452029
Sp/ R. Rasmussen Sandavágur, tel 332350
P/F Zacarias Müller Porkeri, tel 373179
Sp/f John Hammer Tvøroyri, tel 372198
S/p Rokoko Norðagøta, tel 441039
Valdemar Simonsen Sørvágur, tel 332861
Nýt korallvatn í tínum dagliga drekkivatni - tað loysir seg.
Vatn er ikki bert vatn. Næstan 70% av likaminum er vatn, og vatn er helmingurin av tí dagligu føðini.
Í upprunalandinum Japan er brúkaraskarin farin upp um 26 milliónir.
SkilaKeyp
Á Túgvu 12 100 Tórshavn Tel/fax 31 77 17
www.skilakeyp.fo t-postur: sk@skilakeyp.fo